tíðinda
sosialurin
blaðið
7,-
Nr. 13 ★ hósdagur 21. januar 1993

# Pensionistarnir

# Verða ikki seigpíndir

–700 krónur verður als ikki talan um at pensionistar, sum eiga sethús yvir120 fermetrar, skulu galda. Talan verður um eina minni upphædd, sum teir eru førir fyri at gjalda, sigur Jóanes Eidesgaard

Síða 6 og 19

## Sera stórur spenningur um búgvið eftir Ford

*Hinar bilasølurnar eru bangnar fyri, at sølan av búnum oyðileggur marknaðin* *Síða 7*

## Føroyskur ferðavinnufilmur skal kappast við aðrar í altjóða kapping

Lesið á síðu 14

## Jan Mayen-dómur kann fáa ávirkan á Føroyar

SÍÐA 9

## BILL CLINTON TÓK VIÐ Í GJÁR

# Eitt heilt nýtt tíðarskeið er byrjað



Lesið um Bill Clinton á síðu 11 & 12

*Danmark í torførari samráðingarstøðu!*

# Jan Mayen-sakin kann fáa fylgjur fyri Føroyar







Í hesum døgum viðger altjóða dómstólurin í Haag trætumálið millum Danmark og Noreg um markið millum Grønland og Jan Mayen.

Dómur fellur helst í málinum í summar, og tað eru tey, sum halda, at dómurin kann fáa sera óhepnar fylgjur fyri Føroyar. Sosialurin hevur tosað við fleiri fólk um henda spurning, men ringt er at fáa nakran at úttala seg alment, tí málið skal vera so eymt.

Tað er nevniliga so, at tað eru danir, sum standa fyri samráðingum við onnur lond um markini við Grønland og Føroyar.

Ein ónavngivin kelda vil vera við, at danir eru í eini sera torførari støðu, nú teir skulu til at verja áhugamálini hjá ávikavist grønlendingum og føroyingum.

Tí meðan teir øðrumegin tvs. millum Grønland og Jan Mayen nokta at góðtaka eitt norskt krav um miðlinjumark, so krevja danir harafturímóti júst miðlinjumark millum Føroyar og Bretland.

### Óheppin støða

Hetta meta summi at vera eina sera óhepna støða fyri Danmark og ikki minst Føroyar. Tí hendir tað, at Danmark fær viðhald í Haag fyri støðu síni í Grønlandi, so kann hetta brúkast av bretum ímóti føroyingum og dønum í spurninginum um markið millum Føroyar og Bretland.

Sosialurin hevur fingið upplýst frá ymsum síðum, at hetta er ein vandi, sum vit eiga at rokna við og sum kann skaða sakina millum Føroyar og Bretland.

Men hesum er danski samráðingarleiðarin í Haag ikki samdur í. Í aðrari grein her í blaðnum vísir hann á, at tað ber ikki til at samanbera støðuna við Jan Mayen við Føroyar.

jan

# Føroyingur við í Haag



Hóast tað snýr seg um Grønland og Jan Mayen, so er ein føroyingur í Haag í løtuni fyri at fylgja við í sakarmálinum har millum Danmark og Noreg. Tað er Dánjal Nolsøe, sakførari og serkønur í undirgrundar- og markspurningum. Landsstýrið hevur ynskt, at hann fylgir við tí sakarmálinum, nú tað verður tikið upp til dóms.

Dánjal Nolsøe sigur við Sosialin, at hann luttekur ikki í sakarmálinum sum so, men umboðar føroysku sjónarmiðini. Við sínum drúgvu royndum og sera stóru vitan á øllum hesum økinum kann hann eisini leiðbeina og ráðgeva dønum, soleiðis at hesir ikki siga ella framføra nakað, sum kann fáa negativar avleiðingar fyri føroyingar.

Dánjal Nolsøe vil ikki gera viðmerkingar til, um dómur í Jan Mayen-málinum kann fáa avleiðingar fyri okkum. Hann er tó sera spentur um, hvat kemur at standa í sjálvum dóminum, tí tað er greitt, at hann fer at viðgera spurningar, sum eisini kunnu setast í samband við trætuna millum Føroyar og Bretland.

-Tað er so mín von, at her kemur einki at standa, sum kann skaða okkum sigur Dánjal Nolsøe.

jan

*Tað er greitt, at kortini omanfyri kunnu ikki samanberast uttan víðari. Men tey geva okkum eina hóming av støðunum. Danmark krevur 200 fjórðinga mark millum Grønland og Jan Mayen m.a við at vísa til standralongd og at Jan Mayen er óbygd oyggj og vrakar tí norska kravið um miðlinju.*

*Millum Føroyar og Bretland ynskir Danmark harafturímóti miðlinjumark og vrakar bretska kravið um at fáa meira øki útfrá princippinum um strandalongd. Il er at siga, hvar ein dómur fer at týða fyri Føroyar. Men verður princippið um strandalongd lagt til grund fyri dóminum millum Grønland og Jan Mayen og Danmark vinnur úr frá hesum premissum, so kann tað sjálvandi koma illa við hjá føroyingum, har vit nettup ikki vilja góðtaka spurningin um samlaða strandalongd sum fortreyt fyri einum dómi.*

*Danski samráðingarleiðarin í Haag sissar føroyingar:*

# -Eg beri ikki ótta fyri at Jan Mayen-dómur fer at skaða Føroyar

*Tey viðurskifti, sum eru galdandi í sakini um markið millum Føroyar og Bretland eru so ymisk frá teimum millum Grønland og Jan Mayen, at føroyingar eiga ikki at bera ótta fyri eini avgerð í Haag, sum gongur ímóti miðlinjuprincippinum sigur Thyge Lehman, leiðari í donsku nevndini, sum er í Haag fyri at verja donsku sjónarmiðini í sakini um markið millum Grønland og Jan Mayen.*

Hetta er eitt gamalt mál, sum ikki kundi loysast við samráðingum millum danir og norðmenn og sum tí endaði í Haag, har báðir partarnir allan januar mánað greiða frá sínum sjónarmiðum.

Dómurin fellur í fyrsta lagi í mai men møguliga í juli. Har eru 16 dómarar, og tað er ómøguligt at siga nakað um úrslitið. Danski samráðingarleiðarin Thyge Lehman sigur við Sosialin, at hann sjálvandi vónar, at dómstólurin í Haag tekur til eftirtektar markið, sum er sett millum Ísland og Jan Mayen, og at markið millum Grønland og Jan Maien tí eisini at at verða sett út frá somu fortreytum tvs. einum 200 fjórðinga marki millum Grønland og Jan Mayen eins og markið er millum Ísland og Jan Mayen og ikki eini miðlinju, soleiðis sum norðmenn krevja.

Hetta er eitt av teimum mest týðandi argumentunum, sum danir brúka í sakarmálinum.

-Vit vóna, at rætturin tekur hetta til eftirtektar hesa støðu, norðmenn hava góðtikið mótvegis Íslandi sigur Thyge Lehman og heldur fram:

-Gongur rætturin ístaðin inn fyri einum heilt øðrum marki, so verða tvey ymisk mark galdandi um somu oyggj, og tað halda vit ikki ein kann góðtaka sigur Thyge Lehman.

## Stórt og ríkt øki

Hann heldur tað hevur stóran týdning fyri bæði Grønland og Danmark at vinna hesa sakina, tí økið ósemja er um er hálva aðru ferð so stórt sum Danmark. Í hesum øki er vanliga sera nógv av lodnu og ein veit ikki, um tað er olja í undirgrundini eisini.

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at Danmark roynir eitt mál við Haag-dómstólin. Tað er hent fleiri ferðir áður.

## Ongar avleiðingar fyri Føroyar

Vit spurdu Thyge Lehman, hvønn týdning ein dómur í Jan Mayen-sakini kann fáa fyri samráðingarnar millum Føroyar og Bretland sigur hann, at støða teirra er, at ein eigur at meta hvørja sak út frá sínum egnu fyritreytum. Hvør sak hevur sína egnu søgu og uppruna.

Thyge Lehman heldur tað tí vera ómøguligt at samanbera eina støðu og eina sak við eina aðra.

## Fortreytirnar

Hann heldur eisini, at dómstólurin í Haag arbeiðir við júst tí í huga, at avgera hvørja einstaka sak "på dens egne premisser", sum hann málber seg.

*-Vit hava nú hoyrt bretar siga, at teir meta, at dómar í fleiri øðrum málum kunnu hava týdning fyri teir í ósemjuni við Føroyar tvs. at teir kunnu brúka aðrar dómar til at rættvísigera síni krøv!*

-Hetta veldst alt um, hvussu eins sakirnar eru. Men sum heild eru sakirnar altíð ymiskar. Tað vilja sjálvandi vera ymisk princípp, sum tú kanst brúka frá eini sak til aðra, t.d. princippið um miðlinjuna, men tú kanst ikki brúka hesi princípp generelt. Tey skulu brúkast í teimum konkretu málunum út frá teimum serligum umstøðunum, sum nú eru galdandi.

## Kunnu ikki samanbera uttan víðari

*-Tú meinar sostatt ikki at bretar uttan víðari kunnu brúka aðrar sakir, har dómar ganga ímóti miðlinju at stuðla seg til í spurninginum um markið millum Føroyar og Bretland?*

-Tað haldi eg ikki. Ein kann ikki samanbera t.d. umstøður í Miðalhavinum við øki í Norðuratlantshavi.

*-Men er tað ikki ein torfør støða hjá donum fyrst at skula samráðast fyri Grønland og har vera ímóti eini miðlinju og um harnæst at skula sam-*

Framhald á síðu 19



*Teir bretar og føroyingar og danir møttust í Havn í fjør. Mynd kalmar*



*Halgir W. Poulsen og Árni Olafson frá donsku samráðingarnevndini. Mynd kalmar*

# Fundur í London 13. mars

Ein av teimum, sum hevur arbeitt nógv við spurninginum um undirgrund og mark er Árni Olafson, serkønur í føroyskum málum í danska uttanríkisráðnum. Sosialurin hevur spurt hann, um ikki Danmark er í eini tvístøðu, nú tað skal verja grønlendsk krøv við at vera ímóti eini miðlinju og føroysk við at vera fyri eini miðlinju sigur hann seg onga viðmerking at hava.

Hann heldur ikki, at hann kann úttala seg í hesum málinum og vísir til danska samráðingarleiðaran í teimum samráðingum vit hava við Bretland, nevniliga Thyge Lehman.

Annars upplýsir Árni Olafson, at samráðingarnar, sum skulu verða í London í mars um markið, eru fluttar nakrar dagar fram til 13. mars.

jan

